# Scilly livir enn

**Føroysku kvinnurnar, sum luttóku í World Pilot Gig Championship á Scilly í 2003, vilja við aftur, og nú Amerada Hess er givið við at stuðla ferðini, fara tær sjálvar at savna peningin inn**

*Tað er ein heilt annar teknikkur, ið skal lærast, tá føroyskir rógvarar seta seg í ein Pilot Gig. Í Føroyum venja tey við Brendan, sum Rórðarsambandið eigur, og á Scilly liggur Kerens og bíðar eftir teimum hvørt ár*



KAPPRÓÐUR
*Marjun Dalsgaard*

Árið 2003 skuldi vera seinasta árið, at Føroyar vórðu umboðaðar í kappingini World Pilot Gig Championship á Scilly. Oljufelagið Amerada Hess er eftir seks ár givið við at stuðlað føroyskum rógvarum í at luttaka á Scilly, men royndirnar við einum øðrvísi róðri í altjóða høpi hevur tó givið nøkrum føroyskum rógvarum so mikið av blóð á tonna, at tær sjálvar fara at savna pening inn til ferðina.

Tað eru kvinnurnar, sum vóru við á Scilly 2003, sum vilja sleppa við aftur næsta ár, hóast luttøkan á Scilly ikki kann vinnast í sambandi við FM-róðurin longur. Ferðin kostar umleið 100.000 krónur, og manningin fer fyrst og fremst at venda sær til privatar fyritøkur fyri at fáa stuðul, men tær umhugsa eisini at skipa fyri tiltøkum av ymiskum slag.

- Tað verður ringt at savna pengar inn, men vit vilja gjarna avstað, tí tað er ein fantastisk uppliving at vera við á Scilly, sigur Jannie Dam Jacobsen, sum er róðursgenta umborð.

Hon var eisini við, tá manningin á Jarnbardi savnaði pening inn fyri at sleppa við til Scilly í 2000.

Tá vóru einans 10-mannafør við í kappingini um at sleppa avstað, men kvinnurnar lótu sær ikki hetta lynda og fóru í holt við at savna pening inn, so tær eisini kundu koma við. Tær vórðu tá nummar fimm av 78 bátum og høvdu harvið besta úrslitið, sum føroyingar hava havt á Scilly.

## Hava lært teknikkin

Jannie Dam Jacobsen hevur verið við á Scilly tríggjar ferðir, og hon heldur, at tað er øgiliga trist at hesin møguleiki ikki verður í framtíðini.

- Tað hevur heilt sikkurt verið ein gularót í FM-høpi, eingin ivi um tað, sigur hon. Somuleiðis heldur hon tað vera keðiligt at gevast nú, tær eru við at læra teknikkin.

- Tað er nakað heilt annað, enn at rógva í Føroyum. Rógvararnir hava ein heilan bekk hvør, og tú rør faktisk í mótsatta borði, sum tú situr í. Haraftrat er tempoið eitt heilt annað, og tú skalt læra at brúka kreftirnar rætt – ikki geva alt beinanvegin, sum føroyskir rógvarar eru vanir at gera – her brennur tú alt av beinanvegin, men rør tú Pilot Gig, skalt tú orka at rógva einaferð 3000 metrar og einaferð 2200 metrar fyrsta dag og tvær ferðir 2200 metrar næsta dag, sigur Jannie.

Í World Pilot Championschip 2003 vunnu føroysku kvinnurnar B-bólkin og vórðu sostatt nummar 13 av 78 bátum. Hartil fingu tær steypið, sum var latið fyri góðan ítróttaranda.

- Tey høvdu helst lagt merki til, at vit vóru seriøsar og drekka heldur ikki – kanska tað var tað, sum gjørdi tað. Vit hava heldur ongan venjara, tað er annars vanligt hjá hinum, sigur Jannie Dam Jacobsen. Í ár høvdu føroysku kvinnurnar fyri fyrstu ferð ein, sum kennur til serliga háttin at rógva Pilot Gig, úti við eina løtu at leggja lag á.

- Eg veit ikki, um tað gjørdi mun, men vit skulu í øllum førum læra at seta tempoið niður – tað er nógv hægri enn hjá øllum øðrum, hóast at vit rógva seigan róður, sigur hon.



*Málið á Scilly er 3000 og 2200 metrar langt, og áskoðarirnir koma út við bátum at hyggja, sum sæst á myndini her*

Jannie heldur, at Føroyar eru vorðnar munandi kendari á Scilly-Oyggjunum eftirhondini og vinarbond eru eisini knýtt millum lond, tey árini hon hevur verið við.

- Tað er serliga róðrafelagið har niðri, Navagissi, og so onkur, sum fylgir væl við í kappróðri, sum vit hava samband við, men eisini rógvarar frá øðrum londum.

ikki lá fyri hjá øllum at koma við, varð hjálp funnin í øðrum bátum, og tað endadi við, at tríggjar frá Jarnbardi komu við: Jannie Dam Jacobsen, Eivy Olsen og Kristianna Dahl Øster, frá Páll Fanga úr Klaksvík, Anna Mohr, frá Riddarànum úr Miðvági, Rannvá Madsdóttir, og frá Gongurólvi úr Havn, Kerstin Rasmussen og Petra Hansen.

Tey, sum ynskja at stuðla teimum sjey í at fara til Scilly, kunnu seta pening inn á konto 1298692 í Føroya Sparikassa



*Føroysku kvinnurnar fáa steyp fyri at hava vunnið B-bólkin í Worl Pilot Gig Championship 2003 á Scilly. Merkið er eftirhondini vorðið kent millum rógvarar og onnur á Scilly, sigur Jannie Dam Jacobsen*

## Gleðiligt at onkur tekur um endan

Ben Arabo frá Amerada Hess heldur tað verða gleðiligt, at onkur tekur um endan, nú teir gevast við at stuðla ferðini til Scilly.

- Tiltakið hevur verið væl móttikið av kappróðarafólki, og tað eru vit fegin um, sigur hann. Amerada Hess fekk føroysku kappróðrarfólkunum ein bát, Kerens, sum er serliga til tey, hvørja ferð tey luttaka á Scilly. Henda avtala er galdandi til 2007 og føroyingar kunnu tískil luttaka hóast Amerada Hess hevur tikið seg úr. Í Føroyum verður vant við Brendan, sum Róðrarsambandið eigur.

Manningin á Kerens varð sett saman eftir, at Jarnbardur vann ferðina til Scilly í sambandi við FM-róðurin 2002. Av tí at tað

**Fakta**

Vinnarir av ferðini til Scilly

**Menn**
1998, Vestmenningur
1999, Eysturoyingur
2000, Eysturoyingur
2001, Havnarbáturin
2002, Argjabáturin

**Kvinnur**
2000, Jarnbardur
2001, Frúgvin
2002, Páll Fangi
2003, Jarnbardur

Tey fyrstu árini var kappingin um Scilly bert fyri 10-mannafør. Í 2000 varð hetta broytt soleiðis, at kvinnur eisini kundu kappast um at koma við, sostatt fóru tvær manningar avstað í 2001 og í 2002. Í 2003 slapp ein manning avstað, og hetta árið gjørdist vinnarin tann báturin, sum hevði flest stig í FM. 2003 er seinasta árið, at ferðin til Scilly er ein gularót í FM-róðrinum.



# Føroyar og Grønland loyvdu Danmark lægri verjuútreiðslur



*Tann ungi verjumálaráðharrin Hans Engell aftur á jørðini eftir ein royndartúr við einum F-16 flogfari*

**Føroyar høvdu stóran strategiskan týdning undir kalda krígnum og vóru saman við Grønlandi við til at sleppa Danmark undan atfinningum fyri, at tað hevði so lágar verjuútreiðslur samanborið við hini NATO-londini. Tað sigur Hans Engell, fyrrverandi verjumálaráðharri, sum heldur stjórnina bera hálvan sannleika fyri Føroyanevndini**

VERJUÚTREIÐSLUR
*Ingi Rasmussen*

»Forsvarsindsatsen i Nordatlanten er i høj grad med til over for vore NATO-partnere – ikke minst USA – at legitimere et forholdsvis lavere dansk forsvarsbudget«.

So greitt sigur Hans Engell tað í bók síni »På slotsholmen« frá 1997. Sostatt stendur verjumálaráðharrin frá 80-árunum í andsøgn við tað, sum danski forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen nýliga hevur boðað Føroyanevndini hjá Fólkatinginum frá. Anders Fogh Rasmussen segði nevndini, áðrenn hon fór á sína føroyavitjan herfyri, at Danmark ongantíð er sloppið bíligari í NATO vegna Føroya støðu í danska ríkinum og plássi í Norðuratlantshavinum.

> Danmark har på intet tidspunkt undraget sig udgifter i Nato som følge af Færøernes status og placering.
>
> *Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, til Føroyanevndina 23. juni 2003*

## Bæði rætt og skeivt

Tað er bæði rætt og skeivt, sigur Hans Engell, sum í dag er blaðstjóri á Ekstrablaðnum, tá Sosialurin spyr hann, um Anders Fogh Rasmussen segði allan sannleikan fyri Føroyanevndini.

– Tað er rætt á tann hátt, at tað ikki hevur verið soleiðis, at donsku verjuútreiðslurnar eru minkaðar, tí vit hava eina kontu, sum eitur Grønland og Føroyar. So kontant er tað ongantíð orðað, sigur Hans Engell.

– Tað er skeivt á tann hátt, at ein fjald dagsskrá altíð hevur ligið undir. Danmark hevur gjøgnum blokkstuðulin til Føroya og Grønlands tryggjað støðufesti í Norðuratlantshavinum – og tað hevur havt eina stóran trygdarligan týdning, sæð frá amerikanskari síðu, sigur hann í somu vending.

## Sluppu léttari

Hans Engell gjørdi sær stóran ómak at vitja allar hereindirnar, bæði í Danmark, Grønlandi og Føroyum, tá hann var verjumálaráðharri. Vitjanirnar í Grønlandi og Føroyum vóru serlig upplivilsi, helt hann, tí londini høvdu so stóran týdning.

> Forsvarsindsatsen i Nordatlanten er i høj grad med til over for vore NATO-partnere – ikke minst USA – at legitimere et forholdsvis lavere dansk forsvarsbudget.
>
> *Hans Engell, fyrrverandi verjumálaráðharri, í bókini »På slotsholmen«*

– Øll tey árini undir kalda krígnum og í 80-árunum er eingin ivi um, at Føroyar spældu ein stóran leiklut fyri NATO. Grønland vigaði meira, heilt vist, men Føroyar høvdu eisini nógv at siga. Danmark hevði øll tey árini ógvuliga trupult við at ganga teimum krøvum á møti, sum NATO setti sínum limalondum. Og tað taldi nógv, serliga frá einum amerikonskum sjónarmiði, at vit loystu nakrar uppgávur í Norðuratlantshavinum, sigur Hans Engell.

Í dag ivast hann í, um strategiski týdningurin í Norðurhøvum er líka stórur, men at hann hevur spart dønum útreiðslur, er púra ivaleyst. Tað ber kortini ikki til at seta krónur og oyru á, heldur hann.

– Kritikkurin ímóti Danmark var ikki heilt so skarpur, tí hildið var, at vit á annan hátt góvu eitt ískoyti. Tað vil siga, at Danmark við Grønlandi og Føroyum læt við sínum ríkisfelagsskapi, sum taldi meira, enn um vit høvdu 2000 hermenn meira ella minni, sigur Hans Engell.

## Betri samband

Sambandið millum danskar ministarar og amerikonsku stjórnina hevur altíð verið serliga gott, minnist Hans Engell, og tað hevur verið Grønlandi og Føroyum fyri at takka.

– Bæði eg sum verjumálaráðharri og mínir eftirmenn hava altíð havt lætt við at komið í beinleiðis samband við amerikonsku stjórnina. Danskir ráðharrar eru ofta bodnir á vitjan í USA og hava havt serstakliga gott samskifti við Pentagon. Tað skyldast ikki lítla Danmark her suðri, men í avgjørdarn mun ta trygdarpolitisku vekt, sum okkara øki í Norðuratlantshavinum góvu okkum, sigur Hans Engell.

Hans Engell og legendariski amerikanski verjumálaráðharrin Casper Weinberger vóru persónligir vinmenn hesu árini í 80-árunum, tí teir hittust so ofta. Tað var ikki so, at teir beinleiðis hildu fundir um Norðuratlantshavið, men samstarvið í verjuøkinum bleiv nevnt.

– Tað var ofta nevnt. Ikki bara ta tíðina, tá vit máttu verja okkum ímóti langtberandi russiskum rakettum, men eisini tá vit tosa um at hava tamarhald í Norðuratlantshavinum, og Sovjett-samveldið í alsamt størri mun arbeiddi við stórum strategiskum flúgvarum, kavbátum og krígsskipum. Tá spældu Føroyar og Grønland ein stóran leiklut fyri okkum, sigur Hans Engell.